# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Tað eru eingir trupulleikar millum meg og Wayne Rooney. Vit eru vinmenn.*

*Cristiano Ronaldo, liðfelagið hjá Rooney í Manchester United og landsliðsspælari fyri Portugal*

# HB tekur fútabannið aftur

**Leiðslan í HB staðfestir, at ósemjan í føroyska fótbóltsheiminum er nú blivin so álvarsom, at HB tekur fútbannið ímóti dystinum millum EB/Streym og VB/Sumba aftur**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrrapartin var fundur millum HB, FSF og ÍSF. Hetta var ein fundur, sum ÍSF-forsetin Heðin Mortensen hevði kallað inn til fyri at røða um kreppuna í føroyska fótbóltsheiminum. Kreppan hevur millum annað hevur havt við sær, at fútabann var sett ímóti steypadystinum millum EB/Streym og VB/Sumba seinasta mikukvøld.

Á fundinum fyrrapartin boðaði leiðslan í HB frá, at hon tók fútabannið ímóti hesum dysti aftur.

- Orsaka av, at málið nú er blivið so álvarsligt, hevur HB avgjørt at afturkallað fútabannið, sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbólti, í einum tíðindaskrivi, sum varð sent út á middegi.

Sambært HB var fundurin við ÍSF og FSF í dag góður og positivur, og partarnir høvdu høvi at greiða frá sínum sjónarmiðum.

### Ítróttardómstólurin skal tala

Málið um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen er tó ikki heilt liðugt enn, tí HB hevur lagt málið fyri Ítróttardóm-stólin hjá ÍSF. Har skal málið ganga sína gongd, hóast FSF ikki viðurkennir Ítróttardóm-stólin, og roknað verður við, at Ítróttardómstólurin kemur við einum úrskurði tann 10. juli.

- Vit bíða nú spent eftir niðurstøðuni av avgerðini hjá ítróttardómstólinum. Tá tann avgerðin fyriliggur, er málið enda frá okkara síðu, sigur Steinfinnur Mittelstein í tíðindaskrivinum.

Forsetin í Fótbólts-samban-dinum, Óli Holm, var við á fundinum fyrrapartin, men hann vil ikki gera viðmerkingar til støðuna í løtuni. Hann vísir til tíðindaskrivið, sum HB hevur sent út.



*- Orsaka av, at málið nú er blivið so álvarsligt, hevur HB avgjørt at afturkallað fútabannið, sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbólti*

## Símun millum teir bestu í Íslandi

Íslendska Frettablaðið hevur gjørt upp, hvørji teir bestu spælararnir eru í íslendsku kappingini, nú 9 umfør eru spæld av kappingini.

Millum teir 11 spælararnar, sum Frettablaðið hevur valt út, er føroyski land-sliðsspælarin Símun Samuelsen.

Símun fór í fjør til Íslands at spæla fyri Keflavík, og serliga í ár hevur tað gingið framúr væl hjá Símuni, sum hevur spælt væl og gjørt fleiri mál fyri Keflavík.

At Frettablaðið peikar á Símun sum ein av bestu spælarunum í íslendsku kappingini, ið verður roknað sum sterkari enn tann føroyska, er eitt ordans herðaklapp til vágbingin. Símun segði herfyri við Sosialin, at hann eisini hevði hugsað um, at íslendska kappingin kann gerast ein lopfjøl til felag í onkrum øðrum landi.

# Joan og Karina aftur við í toppinum

**Joan Bláfoss og Karina Ottosen stóðu seg væl í triathlon-kapping við elituna í Danmark**

TRIATHLON
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin var DM í triathlon á OL-teinum hildið í Århus. Kappast varð í 1500 metra svimjing, 40 kilometra súkkling og 10 kilometra renning.

Millum luttakararnar í kappingini hjá kvinnum vóru tær báðar føroysku Joan Bláfoss og Karina Ottosen, og tær stóðu seg báðar væl í kappingini.

Tað vóru bert átta kvinnur við í kappingini, men kappingin var sterk, tí í feltinum vóru donsku landsliðstriatletarnir Charlotte Kolters og Helle Frederiksen, og tær vóru favorittar til at vinna kappingina.

Charlotte hevur havt tru-pulleikar við krampum á teimum seinastu kap-pingunum í útlondum, og teir skuldu eisini fara at vísa seg í hesari kappingini.

Í svimjingini vóru Charlotte og Helle fyrstar upp úr vatninum, Karina var við í næsta bólki og Joan við í síðsta bólkinum. Á fyrsta umgangi á súkkluni fekk Charlotte krampar, og hon noyddist at gevast, og eftir tað lá Helle einsamøll á odda.

Karina Ottosen rýmdi frá restini av feltinum í súkklingini, og hon var í rímiligum avstandi frá Helle allan vegin á málið. Joan Bláfoss fekk trupulleikar við ketuni, og hon datt aftur um bólkin. Hon kom tó afturíaftur, og hóast hon skuldi stríðast ófórt á súkkluni allan vegin, hevði hon so nógvar kreftir eftir, at hon hevði bestu tíðina í renningini.

Kappingin endaði við, at Hella Frederiksen koma fyrst á mál. Hon var væl frammanfyri Karinu Ottosen, ið endaði sum nummar tvey. Joan Bláfoss var júst ov stutt í kappingini um triðja plássið, men endaði sum nummar 4.

Karina og Joan skulu fyrst í august mánaði verða við í DM í ½ Ironman, sum verður hildið í Fredericia.